**Samandráttur av fundarsamtykt hjá Hvalbiar Kommunu tann 16. des. 2014**

Møttir: Trúgvi Gudmundarson, Rúni Thomsen, Magni Bertholdsen, Eyðfinn Debes,
Martin í Nesi, Niels J. Thomsen og Jóhan Eli Poulsen.

| | |
|---|---|
| **Mál 1:**<br>**Umsókn um rakstrarstuðul til S N B.** | Til 1:<br>Samtykt varð einmælt at stuðla Suðuroyar Norðara Bjargingarfelag við kr. 25.000,- í 2015. |
| **Mál 2:**<br>**Umsókn um stuðul við keyp av bókini** | Til 2:<br>Samtykt varð ikki at keypa bókina. |
| **Mál 3:**<br>**Umsókn um stuðul við keyp av filminu**<br>**Lítli Dímun.** | Til 3:<br>Samtykt varð einmælt at keypa 10 eintøk. |
| **Mál 4:**<br>**Umsókn um stuðul til verkætlanarferð**<br>**maskinmeistaralesandi.** | Til 4:<br>Samtykt varð at stuðla við kr. 1.000,-. |
| **Mál 5:**<br>**Umsókn um stuðul til "Í menniskjum g**<br>**tokki".** | Til 5:<br>Samtykt varð at siga frá, at kommunan hevur stuðlað tiltakinum við keyp av jólakalendarum frá Lions Club Suðuroy. |
| **Mál 6:**<br>**Umsókn um stuðul til fløguútgávu frá**<br>**Froðbiar Sóknar Bluesorkestri.** | Til 6:<br>Samtykt varð einmælt ikki at stuðla útgávuni. |
| **Mál 7:**<br>**Umsókn um samanlegging av matr. nr**<br>**100a í Hvalba.** | Til 7:<br>Samtykt varð at viðmæla samanleggingini. |
| **Mál 8:**<br>**Umsókn um sundurbýti av jørð - matr.**<br>**403a, Sandvík.** | Til 8:<br>Samtykt varð at viðmæla umsóknini, tá frábýttað jørðin verður løgd saman við ognini matr. nr. 435a. |
| **Mál 9:**<br>**Uppskot um bygdarráðsfundir 2015.** | Til 9:<br>Samtykt varð einmælt at taka undir við uppskot-inum um fundir í 2015, tó við tí broyting, at fundirnir verða kl. 17.30. |

| | |
|---|---|
| **Mál 10:**<br>**Kunning um málsviðgerð síðani síðsta** | Til 10:<br>Trivnaðarnevnd:<br>Dagstovnur í Hvalba: Kunnað varð um, at bygdar-ráðið hevur havt fund við Tummas Niclasen.<br>Samtykt varð einmælt, at Tummas arbeiðir víðari við tekning v.m. Í hesum sambandi. |
| **Mál 11:**<br>**Onnur viðgerð av eykajáttan fyri 2014.** | Til 11:<br>Eykajáttanin á kr. 1.040.000,- varð einmælt samtykt. |
| **Mál 12:**<br>**Fundarsamsýning til bygdarráðslimir.** | Til 12:<br>Samtykt varð, at Fíggjarnevndin tekur málið viðv. samsýningum upp til viðgerð. |
| **Mál 13:**<br>**Ikki alment mál.** | Til 13:<br>Tilboð uppá keyp av ogn. |